# Ræðuligt!

## Estland kollvendi dystinum í seinastu minuttunum og vunnu 2-1 á Føroyum

Uni Holm Johannesen

Føroyska landsliðið var fyrst tríggjar minuttir frá at vinna á útivølli móti Estlandi.

So var føroyska landsliðið brádlig tveir minuttir frá at fáa javnleik móti Estlandi.

Men tá avtornaði legðist enn eitt tap afturat í hagtølunum hjá føroyska fótbóltslandsliðnum.

Kaimar Saag og Raio Piiroja syrgdu fyri sigursmálunum í tíðini, sum dómari hevði lagt afturat. Jóan Símun Edmundsson stóð fyri føroyska málinum.

Tarmo Ruutli, venjari hjá Estlandi, er týðiliga fegin um sigurin.

- Eg hevði ikki ynskt at verið í somu støðu sum Brian Kerr, sigur hann við fifa.com.

**Estland – Føroyar 2-1 (0-1)**

**Dómarar:** Ante Vucemilovic-Simunovic, Dalibor Conjar og Miro Grgic, Kroatia.
**0-1:** Jóan S. Edmundsson, 28.
**1-1:** Kaimar Saag, 90.
**2-1:** Raio Piiroja, 90.
**Estland:** Sergei Pareiko – Raio Piiroja, Dmitri Kruglov (Sander Post, 70.), Aleksander Dmitrijev, Sander Puri (Ats Purje, 76.), Andres Oper (Kaimer Saag, 62.), Tarmo Kink, Konstantin Vassiljev, Ragnar Klavan, Enar Jaager og Alo Barengrub
**Á beinkinum, uttan at verða innskiftur:** Mihkel Aksalu, Martin Vunk, Gert Kams og Sergei Zenjov
Gult kort: Einki.
**Venjari:** Tarmo Ruutli
**Føroyar:** Gunnar Nielsen – Jónas Tór Næs, Jóhan T. Davidsen, Atli Gregersen, Hendrik Rubeksen – Christian Lamhauge Holst, Jann Ingi Petersen (Bogi Løkin, 85.), Fróði Benjaminsen, Jákup á Borg (Rógvi Poulsen, 67.), Símun Samuelsen (Jústines R. Hansen) – Jóan Símun Edmundsson
**Á beinkinum, uttan at verða innskiftur:** Tórður Thomsen, Egil á Bø, Christian Mouritsen og Christian Høgni Jacobsen
**Gult kort:** Gunnar Nielsen, Jákup á Borg og Jóan Símun Edmundsson
**Venjari:** Brian Kerr



*Rógvi Baldvinsson hevur lagt Føroyar á odda 2-1 og fegnast saman við Dánjali Davidsen. Í bakgrundini sæst ein vónbrotin Andorra leikari*

Bill M. Jacobsen:

# Maður kemur altíð í mans stað!

**Tað er staðfestingin, eftir at føroyska U-21 landsliðið mikukvøldið, uttan fleiri av lyklaleikarunum, megnaði at venda hóttandi 1-0 tapi til ein góðan 3-1 sigur. Føroyar hava nú vunnið sær 11 stig í EM undankappingini og tað er søguliga nógv**

Tróndur Arge

Venjararnir hjá U-21 landsliðnum, Bill McLeod Jacobsen og Heðin Askham, høvdu gjørt fleiri broytingar á liðnum. Nakrar vóru tvungnar, tí at lyklaleikarar sum Christian R. Mouritsen, Jóan Símun Edmundsson og Rógvi Poulsen vóru við í Estlandi við A-landsliðnum. Aðrar vóru gjørdar fyri at liðið skuldi standa best til mótstøðuna. Rógvi Holm, Jóhan Ellingsgaard, Finnur Justinussen og Odmar Færø hava allair spælt týðandi leiklutir á U-21 landsliðnum, men tað var ikki pláss fyri teimum, meðan Rógvi Baldvinsson, Steinar Kamban og Erling Jacobsen allir vóru við frá byrjan.

- Vit hava fyrr gjørt nógvar broytingar, eitt nú undan sigrinum á Russlandi, segði Bill undan dystinum, sigur Bill M. Jacobsen.

**- Vit hava fyrr gjørt nógvar broytingar, eitt nú undan sigrinum á Russlandi**
BILL M. JACOBSEN

### Vánaligur fyrri hálvleikur

Í hálvleikinum var Andorra á odda 1-0 og meðan frásøgnin úr Estlandi, har Føroyska landsliðið misti alt á gólvið, rungaði út yvir Gundadal. Tá var líkt til at hetta mikukvøldið skuldi gerast til eitt vónbrot. Okkurt hava Bill og Heðin sagt í hálvleikinum, tí U-21 landsliðið var hamskift í seinna hálvleiki og longu eftir fimm minuttir bragdaði.

**-Tað prógvar bara at maður kemur altíð í mans stað**
BILL M. JACOBSEN

### Longur fram á vøllin

- Vit skiftu til 4-4-2 í hálvleikinum og valdu at flyta liðið nógv longur fram á vøllin. Tað eydnaðist væl og vit skaptu nógvar møguleikar, sigur Bill M. Jacobsen.

Ein verju villa hjá Andorra verður revsað umgangandi av Steinar Kamban. Eitt korter fyri tíð legði Rógvi Baldvinsson Føroyar á odda 2-1, áðrenn Kristoffur Jacobsen, við beinleiðis frísparki, skoraði til endaliga úrslitið 3-1 til Føroyar. Hóast sjey leikarar eru við A-landsliðnum, sum hava aldur til U-21 landsliðið, so vunnu vit á Andorra.

**Maður kemur í mans stað!**

- Tað prógvar bara at maður kemur altíð í mans stað, staðfesti ein fegin Bill M. Jacobsen eftir dystin.

Kristoffur Jacobsen var ikki í iva um, at frísparkið var ætla málhorninum og ikki einum føroyskum høvdið, ið skuldi stúta tað inn.

- Sjálvandi var tað vil vilja. Málmaðurin hjá teimum er lágur av vøkstri, so eg smekkaði til, sigur Kristoffur Jacobsen avgjørdur eftir dystin.

*trondur@sosialurin*

## Fakta

**Føroyar U-21 – Andorra U-21(0-1) 3-1**

| | |
|---|---|
| **0-1** | Lluis Blanco(31) |
| **1-1** | Steinar Kamban (51) |
| **2-1** | Rógvi Baldvinsson (74) |
| **3-1** | Kristoffur Jacobsen ( 89) |

Jóan Pauli Jacobsen(liðsk) – Erling Jacobsen, Rógvi Baldvinsson, Dánjal Davidsen, Viljomur Davidsen. – Kristoffur Jacobsen, Steinar Kamban(Dánjal á Lakjuni 62.min), Hallur Hansson – Øssur Dalbúð(Finnur Justinussen 75.min), Páll Klettsgarð(Odmar Færø 89.min) og Pól Jóhannus Justinussen.
**Venjarar:** Heðin Askham og Bill M. Jacobsen.
**Dómari:** Angel Angelo(BUL)